# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Brúdleyp

Leygardagin 4. februar kl. 13.00, giftast í Kildevældskirken í Keypmannahavn, Arnfríð Joensen, Saltnes, og Mads Høhne Kromann, Keypmannahavn.
Brúdleypið verður hildið í Sophienholm Cafeteria, Nybrovej 401, 2800 Kgs. Lyngby, fyri innbodnum.

### Prógv

25. januar fingu Hanna Krista Poulsen, Toftir og Iris Fríða Magnussen, Tórshavn, prógv sum sosialráðgevarar frá Ålborg Universitet.

Haldis Egholm, Norðskála, hevur tann 31. januar 2006 lokið prógv sum ídnaðarlaborant á Den Kongelige Veterinær Landbohøjskole. Institut for Økologi, faggruppe Zoologi á Frederiksberg.

Lillian Larsen úr Fuglafirði hevur á Nordjyllands Erhvervsakademi tikið prógv sum byggifrøðingur.

Turið Reinert, Kaldbak, hevur 26. januar lokið prógv sum djóralækni á Landbohøjskolen í Keypmannahavn.

Jon Joensen, Vágur, tók 26. januar prógv sum Cand.sen. í fysioterapi á Bergens Universiteti.

### Brúdleyp

Í morgin, 4. februar kl. 13.00 giftast í Kildevældskirken í Keypmannhavn, Arnfríð Jeonsen, Saltnes og Mads Høhne Kromann, Keypmannahavn. Brúdleypið verður hildið í Sophienholm Cafeteria, Nybrovej 401, 2800 Kgs. Lyngby, fyri innbodnum.

Í morgin, 4. februar kl. 13.00 giftast í Sjóvar kirkju, Nicolina í Lág, Strendur og Álvur Jøkladal, Fuglafjørður. Veitslan verður hildin í samkomuni í Siloa í Fuglafirði kl. 17.00 fyri innbodnum. Vælkomst er frá kl. 21.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.
Silvurbrúdleyp
Mánadagin 6. februar hava Katrin og Jógvan Linklett, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

### Gullbrúdleyp

Í morgin, 4. februar kunnu Sunneva og Ejler Sørensen, Porkeri halda gullbrúdleyp. Dagurin veðrur hildin heima millum kl. 13.00 og 18.00.

Sunnudagin 5. februar kunnu Hildibjørg og Jógvan I. Olsen, Toftir, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Svangaskarði kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

### Starvsdagur

1. februar hevði Hans Djurhuus, Nes, Vágur, 35 ára starvsdag hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

### 60 ár

Í morgin 4. februar verður Jógvan Páll Sevdal, Leirvík, 60 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst í Arbeiðsmannafelagshúsinum frá kl. 11.00-16.00.

### 80 ár

Sunnudagin 5. februar verður Jacobina Jacobsen, ættað úr Hósvík, búsitandi í Havn, 80 ár. Vælkomst verður hjá ommudóttrini, Skemmingsgøta 14A, (Norðasta Horn) leygarkvøldið 4. februar frá kl. 18.00.

## Jógvan Páll Sevdal 60 ár



Leygardagin 4. februar fyllir Jógvan Páll Sevdal í Leirvík 60 ár.
Jógvan Páll er leirvíkingur. Sum 15 ára gamal fór hann í 1961 í læru á Tórshavnar Skipasmiðju sum maskinlærlingur. Seinni fór hann á maskinskúla og tók víðkað maskinmeistaraprógv í Danmark í 1972.
Eftir lokna útbúgving arbeiddi hann í góð trý ár sum maskinmeistari á sildaverksmiðjuni Havsbrún í Fuglafirði. Síðan arbeiddi hann sum virkisleiðari hjá fyritøkuni Brøður Petersen í Fuglafirði. Eisini var hann stjóri á Brennistøðini hjá IRF á Hagaleiti í fimm ár.
Seinastu árini hevur hann siglt sum maskinstjóri við norskum off-shore bátum. Hann hevur siglt mest í Norðsjónum, men seinasta hálva árið í Egyptalandi.
Umframt sína útbúgving innan maskinøki, tók Jógvan Páll eisini prógv á Emmaus Bible College í Chicago USA. Hann vaks upp í einum heimi, har foreldrini ynsktu, at teirra børn skuldu hoyra Harranum til og ganga Hansara vegir, sum 11-12 ára gamal kom hann til persónliga trúgv á Harran Jesus.
Jógvan Páll hevur verið virkin innan trúboðan. Umframt at vera virkin í samkomuni Hebron í Leirvík, ferðast hann nógv kring landið og heldur møtir og møtirøðir saman við vinmonnunum Páll á Lakjuni, Svenning av Loftið, Poul Jóhan Djurhus, Osmund Justinesen og Hjørleif Vang.
Eitt av hjartamálunum hjá Jógvan Páll er ferðslutrygdin í sambandi við undirsjóartunnilin til Klaksvíkar. Hann, eins og allarflestu leirvíkingar, er heitur talsmaður fyri at øll ferðslan gjøgnum bygdina verður leidd á tryggasta hátt gjøgnum ein tunnil undir bygdini niðri við sjóvarmálan.
Foreldrini hjá Jógvan Páll eru: Fía, f. Lervig, av Regni í Leirvík, dóttir Hansinu, ættað úr Sjóvartúni á Skála, og Jógvan Lervig, uppi við Stein, úr Leirvík, og Alex Sevdal úr Fuglafirði, sonur Jóhannu Sofíu, ættað úr Skúvoy, og Poul Johannes Midjord, ættaður av Miðgerði í Kollafirði. Alex, pápi Jógvan Páll, andaðist í 1977, 69 ára gamal. Fía fylti 2. februar 94 ár og býr á sambýlinum Vesturstova í Fuglafirði.
Fía og Alex fingu fýra børn: Regin, sum býr í Runavík, Jógvan Páll og Hegin, sum búgva í Leirvík, og Osla sum býr á Kambsdali.
Eitt sum er merkisverkt, og vert at nevna í hesum sambandi, er at Fía, mamma Jógvan Páll, og tvær systrar hennara fingu allar fýra børn, fyrst tríggjar dreingir og eina gentu, sum er yngst og tykist mynstrið at ganga aftur í familjuni.
Jógvan Páll er giftur Margaret, dóttir Evald og Jardtrud Johannesen úr Fuglafirði. Tey eiga dóttrina Fíu, sum er gift Poul í Skorini úr Havn, ið eiga børnini lítlu Elsu og lítla Jógvan Páll.
Føðingardagurin verður hildin við vælkomst í Arbeiðsmannafelagshúsinum í Leirvík frá kl. 11-16.

### Minningarorð um elskaða beiggja mín

## Dánjal Sjúrður Ennistíg

**Føddur 10. juni 1956 deyður 30. oktober 2005**



Tung og óskiljandi vóru telefonboðini, eg fekk leygarnáttina 3. oktober, tá Súsanna systir mín ringdi og segði at Dánjal, okkara elskaði bróðir, var fluttur heim til Harran. Dánjal var fluttur heim í dýrdina og er ikki ímillum okkum meira.
Alt steðgaði upp. So komu tankarnir, og spurningarnir. Hví? Hví?
Ja, síðst eg sá hann, var hann so livandi, og vísti seg at vera so frískur.
Men hansara dagar vóru taldir. Eg minnist hann, tá ið eg var lítil, og uppeftir. Hann var altíð so umhugsin um meg og sá so stórt í mær.
Dánjal var so sera, sera følsamur og ærukærur, hann elskaði síni nærmastu.
Hvønn dag og hvørt kvøld, kom hann inn hjá mammu og pápa, og vitaði hvussu visti við. Tey lógu hansara hjarta so nær.
Hann gleddi seg til at mamma og pápi fóru at fylla 70 og 80 nærmasta dagin og hansara ynski var, at dagurin skuldi standa í hansara nýggju húsum.
Men Harrin vildi tað ikki so. Nei, ikki vardi tað okkum, at Harrin skuldi taka hann heim áðrenn. Hvønn dag tá Dánjal kom inn til mammu og pápa, so setti hann seg við orgli og spældi sangin:
*Mær leingist til hitt blíða land,*
*Harrin Jesus er, har sundur*
*støkk hvørt trælaband, sum bindur*
*okkum her*
Hann var so glaður um at vera fluttur í nýggj hús, og var so upplyftur, at hann, Marjun, Sólva og Magnus høvdu fingið føtur undir egið borð, ja Marjun, Sólva og Magnus vóru hansara eygnasteinar. Tey áttu eitt pláss innast í hansara hjarta.
Sum tað stendur í Bíbliuni: ongin veit á morgni, hvar hann á kvøldið gistir.
Babba tosaði við Marjun, konu Dánjal. Hann segði, tá Harrin sær at barn sítt er troytt, so tekur hann tað heim til sín.
Vit, sum fylgdu Dánjal til hansara síðsta hvíldarstað, sóu hvussu nógv, hann var avhildin. Ein stórur lískskari, segði honum seinasta farvæl.
Harrin tekur, Harrin gevur, Harrin tók Dánjal heim.
Góða Marjun, Sólva og Magnus. Má Harrin síggja til tykkum, og styðja tykkum í tykkara stóra missi í hesi sváru tíð.
Við hesum fátøku orðum lýsi eg frið yvir elskaða beiggja mín Dánjal.
Hvíl í friði við Sálma 121.

**Systir tín Jonitha**

### Dagurin

**4. februar. Veronica**. Vit vita einki um hesa halgikvinnu uttan tað, sum halgisøgan sigur, at hon var ein, ið fylgdist við Jesusi, og at hon á leiðini út til Golgata turkaði sveittan av andliti hansara. Tá ið hon fekk turrklæði aftur, stóð mynd frelsarans á tí, og tað varð síðani varðveitt sum ein dýrur gripur. Hann varð róptur vera *ikon*, sum merkir *tann sanna myndin*. Harav kemur eisini navnið á halgikvinnuni.

**5. februar. Ata**, deyð umleið ár 250. Henda vakra unga gentan í Cataniu á Sikiloy vildi ikki lovast heidnum fríggjara, av tí hon var kristin, og varð eftir ræðuligar pínslur tikin av døgum. Navnið er grikst og merkir *tann góða.*

**6. februar. Duruta**, deyð umleið ár 300. Henda unga gentan í Kesarea í Kappadokiu vildi heldur ikki vita av einum heidnum fríggjara, sjálvum landshøvdinginum, og hann læt hana hálshøgga. Navnið Dorothea er grikst og merkir *Guðs gáva.*